økjum søkt samstarv við menn og kvinnur burturi og heima, sum hugsast kunnu at vera før fyri at bróta upp úr nýggjum innan føroyskan ídnað. Slíkt arbeiði er drúgført, men eigur ongin at gevast á hondum av hesi orsøk. Hann sum einki leitar, onki finnur. Royna vit ikki aftur og aftur spyrst einki burturúr, og vit mugu tá sanna orðini: »Fryst er jørð fyri vesælasvínum«.

Skipabyggiídnaðurin

Tað er eingin loyna, at henda vinnugrein leingi hevur verið fíggjarliga heilsubrekað, hóast vit kunnu siga, at frá almennari síðu er avbera nógv gjørt fyri at hjálpa henni burturúr byrjanartrupulleikum og fram í trygg arbeiðskor, og hóast arbeiðið, sum avrikað er, av øllum er mett sum valaverk.

Veðhaldsskyldur landskassans eru vorðnar effektivar bæði á Skála og í Vestmanna, og heldur tí raksturin fram fyribils so leingi hesar veðhaldsbindingar ikki eru loystar, og tað vil siga inntil nýbyggingarnar eru lidnar. Áðrenn tingið fer heim hesa ferð, ætlar landsstýrið at fáa tingsins heimild til at halda fram við rakstrinum uttan steðg og helst uttan likvidatión í hvussu so er til skipini eru avhend. Hetta vil bera í sær, at neyðugt verður í summum førum at leggja út pening eisini útum avmarkingina, sum liggur í veðhaldinum fyri at gera skipini liðug. Vit vænta, at tingið tekur undir við okkum í hesum, og vænta, at tingið seinni í heyst eisini tekur undir við lóggávu, sum tryggjar royndunum til framhald av skipabyggiídnaði í Føroyum.

Her skulu stórtøk til og nógvur peningur. Mangur vil halda, at henda avbjóðing er so stór, at best er at geva skarvin yvir alt fyri eitt.

Okkum tykir tó, at nýbygging eisini gerst neyðug, skal okkara stóri, fjølbroytti og við brekni fiski- og farmaskipafloti eiga góðar og vælútgjørd ar umvælingarsmiðjur at leita til. Tær margbroyttu umvælingarnar krevja búgvið arbeiðsfólk, og hesi fært tú einans alt undir byggiarbeiði. Vælaarbeiðarar støðast ikki í smiðju, sum einans virkar óregluliga í teim umvælingarriðum, sum vinnuhátturin bindir okkum til.

Beinanvegin landsstýrið tíðliga í juni frætti um verunligu støðuna, setti tað seg í samband við serfrøðingar innan sokallaðu »verftssjúkuna«, sum herjað hevur í Europa og aðrastaðni. Hesir bóru skjótt at, og hava vit fingið gjørda ritgerð, sum greiniliga viðger allar sjúkrafráboðarar (symptomir) bæði generelt og á føroysku smiðjunum, sigur frá sjúkuni sjálvari og mælir til ymisk heilivág.

Hesi eru:

Ein fullkomulig umlegging av arbeiðslagnum.

Byggjan av plánleggingarstovni við tveimum monnum.

Umskifti av ábyrgdini og aðrar vegir til informatiónsgongdina.

Økjan av orkuni hjá tí einstaka arbeiðsmanninum, so hann gerst førur fyri at arbeiða 1½—2 ferðir ta tilfarsmongd, hann nú sleppur at arbeiða og hetta uttan longri arbeiðstíð ella størri móði.

Nýíløgur í vissan mun — (tó smá tøl hetta snýr seg um).

Og seinast, men avgerandi, tryggjan av sáttmálum 1¼—2 ár framyvir, og her má vera talan um seriubygging, men øðrvísi enn nú.

Hetta seinasta kenna vit til, tí vit hava tryggjað byggiharrum, at teir fáa skip sín. Men hava vit hugsað nóg mikið um, at skipasmiðjan fær frægasta prísin fyri arbeiði sítt? Mugu vit ikki undir at tryggja tveir vegir til ymsar tíðir undir fyribilssáttmála við landsstýrið ella annan stovn og síðan bindandi sáttmála við keypara. Fyrst skipasmiðjuni, so hon fær arbeiðsfrið og líkindi til at virka skipið so langt ávegis sum gjørligt, og síðan hjálpa henni at avhenda skipið. Nú fæst betur prísur enn tá sáttmálin er undirritaður tvey ár áðrenn avhending. Frá hesum seinna sáttmáladegi tryggjar løgtingið keyparanum, at hann fær skipið til avtalaðan prís. Treytað av at fullkomuligt om anlop fíggjarliga ikki hendir í byggitíðini, vil hetta betri tryggja smiðjuni vinning og samstundis avmarka tapsvanda landskassans.

Tey skipasløg, hugsað hevur verið um, er í Vestmanna, 4—5 útróðrarbátar sum »Th. Nygård«, bert nakað longri, breiðkaðir og við størri maskinorku. Á Skála 3—4 saltfiska hekkutrolarar av »Sjúrðarberg« slagnum ella 2—3 av hesum og 1—2 flakabátar eftir nærum somu teknningum. Hesir skulu avloysa teir 6 síðutrolar arnar. Annar møguleikin er 4—5 smærri hekkutrolarar til veiðu av konsumfiski og ídnaðarfiski nærhendis Føroyum við pelagiskum tólum og botntroli. Men aðrir møguleikar eru sjálvandi eisini t.d. havrannsóknarskip, verju- og bjargingarskip eins væl og onnur skipasløg.

Havi hug at endurtaka hvat kønur maður hevur sagt:

Eingin skipasmiðja hevur spart seg burtur úr trupulleikum.

Eingin hevur við øktum tím um, sum vegna yvirskotið av hvørjum tíma skuldu fleirfalda vinningin, greitt setningin.

Eingin hevur bjargað sær við betri prísi enn marknaðurin fyrisetur.

Men allir sum ein av teim, sum reistu seg av sóttarsong hava »produserað« seg burtur úr kreppuni við at stytta um byggitíðina, nýta ónýttar tímar og nýta nýttar tímar betri.

Landsstýrið mælir til, at vit fara undir byrðuna bæði í Vestmanna og á Skála og sam skipa hesar. Aðrar taka vit við, um tørvur verður á tí.

Landsstýrið roknar við, at hvør kommuna, har borgari eigur arbeiðsplass á smiðju, stuðlar, at einstaklingar allastaðni stuðla, og at arbeiðararnir vera við til at stuðla fíggjarliga, men fyrst og fremst kýta seg, so at virðið av hvørj um tíma teirra nærum [illegible] ast. Løgtingsins og landskassans partur kann tá ikki liggja eftir.

»Teir mega land byggja,ið liva vilja«, og í hesum máli, sum onkuntíð fyrr, gerst tað neyðugt at hugsa djarvt og stórt júst í krepputíðini, tí »lítið kemur av lítlari vón«.

Kann ikki lata vera við at sammeta við støðuna í 1967, 68 og 69, tá menn hildu fram at byggja hóast dapurt útlit.

Vert er at leggja afturat undir umrøðuni av skipabyggingarmálinum, at landsstýrið hevur luttikið í samráðingum um økjan av útlánspeningi realkredittstovnsins. Framyvir verð ur árliga ríkiskassaveðhaldið fyri realkreditlánibrøvum hækk að munandi.

Samlaði lánspeningurin økist av rentum og avdráttum, men tilskirvingarnar fyri næsta fimm ára skeið koma eisini at vaksa og verða at liggja ímill um 75 og 90 mill. kr. ialt. Seinasta fimm ára skeið var talið 50 mill. kr.

Tær stóru burturløgurnar í grunnin til endurnýggjan av skipaflotanum og yvirskotið av landskassaroknskapinum hava gjørt, at landið, um hildið verð ur fram á sama hátt, er fört fyri at greiða sín part góða tíð framyvir.

Harafturat er møguleikin fyri fiskaribankaláni upp í 70 pst. enn tøkur, og kann roknast við at effektiva rentan av hesum lánum við tíðini minkar, serliga um Danmark fer upp í E.E.C.

Fleggingarmøguleikarnir inn an endurnýggingina eru sostatt betri enn fyrr, men skulu vit undir stórútbygging sum t.d. byggjan av fleiri skuttrolarum fyri 17—25 mill. kr. hvør, er neyðugt við bøttum skipanum.

FRAMHALD

FØROYA
BANKI
banki FØROYA

Hámarksgjøld

fyri koyring við lastvognum

Prísráðið hevur ásett hesi hámarksgjøld fyri lastvognar at galda frá í dag:

		pr. tíma:
2—4 tons	kr.	39.00
frá 5 tons og uppeftir	—	45.00
afturat hesum verður	—	10.00

pr tíma um kranin verður nýttur.

Frá kl. 17—21 verður yvirtíðarl. 35% av bilstjóralønn
Frá kl. 21—08 verður yvirtíðarl. 60% av bilstjóralønn

Fyri einstakar túrar, sum eru styttri enn ein tíma, verður gjaldið ..... kr. 19.00

Fyri koyring við sandi, gróti og skervi verður goldið kr. 8.00 pr m³ fyri teir fyrstu 3 km. haraftrat kr. 1.00 pr m³ fyri hvønn fylgjandi km.

Har arbeiðið umfatar meir enn einstakan túr eigur serlig avtala at verða gjørd partanna millum.

Rokningin verður at skriva soleiðis, at talið á peninginum fyri bilin stendur *fyri seg* og talið á peninginum fyri yvirtíð *fyri seg*.

Klagur frá fólki viðvíkjandi hægri gjøldum verða at senda ráðnum.

Tórshavn 27. juli 1972.

PRÍSRÁÐ FØROYA

Vit hava altíð á goymslu alt tilfar til

blikksmíð
sanitet
hitaverk
ventilatión

P/F DEMICH

Tlf. 1 1071 . Tórshavn

Verður sent um alt landið

Ledig stilling

I forbindelse med den forestående indførelse af hjemmehjælp (husmoderafløsning) skal der besættes en stilling som hjemmehjælpsleder.

Lederen skal medvirke ved tilrettelæggelsen af hjemmehjælpsordningen og senere varetage den daglige ledelse af denne.

Det stilles ikke bestemte krav til forudgående uddannelse eller virksomhed, men lederen, som må være en moden kvinde eller mand, må være villig til at uddanne sig efter nærmere aftale.
Tiltrædelse efter nærmere aftale.

Lønnen, som også betales under en eventuel uddannelse, vil blive fastsat under hensyn til alder, uddannelse og forudgående beskæftigelse.

Stillingen besættes af landsstyret og rigsombudsmanden i forening, og ansøgninger bedes indsendt til rigsombudsmandens kontor inden 1 måned fra dato.

Oplysning om stillingen kan fås på tlf. [illegible]

RIGSOMBUDSMANDEN PÅ FÆRØERNE,
Tórshavn, den 25. juli 1972.